
Føroyskt chat gevur ungfólki møguleika fyri at liva eitt annað lív á internetinum. Eitt lív har fordómar eru ringir at fáa eyga á, og har vinarbond kunnu knýtast tvørtur um leidningar og telduknappaborð

Túnatos í cyberspace



EYÐUN KLAKKSTEIN TEKNINGAR: JÓGVAN Á HØVDANUM, YNGRI

Tað er altið onkur at finna har. Er tað ikki Twoface ella Tweetie, so er tað Sokka-Boiler ella Huldan. Faroese_chat er eitt spælipláss fyri telduskoltar, skillanætmingar og føroyingar annars, sum eru rættir av einum lutvist nýggjum virus, chatvirus.

A ti rævdandi stóra og anarkistiska internetinum finnast óteljandi støð, har fólk kunnu stytta sær um stundir við at chatta – at tosa saman frá teldu til teldu. Og tað kann gerast á nærum einum og hvørjum tungumáli og í nærum einum hvørjum samanhangi – tað er altið okkurt stað, sum er ognað tínum máli ella serliga áhugamáli.

Og so lata hesi fólkini fingrarnar dansa oman á telduknappaborðinum, senda eini boð fyri og onnur eftir út á tann bleiktrandi skiggjan, og millum spurningar og svar, skemt og álvara, finna tey ein feril av einum øðrum heimi; einum telduheimi, har styttsti vegurin millum tey er eitt telduknappaborð, og har 1-tøl og 0-tøl siga meira enn túsund orð.

Nýggi, fagri heimur. Burtur við brøvum, frímerkjum, telefonsamrøðum og telefaxum. Hvør hevur brúk fyri meira enn einum internetsambandi, har heimurin liggur fyri tína fótur, tá tú hevur latið telduna snara tey fýra tølini til servaran hjá Føroya Tele.

Tveita fólk á dyr

Eisini føroyingar kunnu práta saman á egnum máli á internetinum. Faroese_chat er mest vitjaða føroyska chatrúmið, og har er gongd í frá tíðliga á morgni til langt út á náttina – ja, so at siga dagnið runt.

Prátið gongur lívliga, og aftanfyri tey lógnu nøvnini, sum verða brúkt sum eitt stokkut skjól fyri veruliga navninum, goyma seg oftast ungfólk. Men ikki bara ungfólk.

Hugflogið er stórt, tá fólk skulu finna sær eitt navn, sum tey kunnu brúka á faroese_chat. Klikkadi, Bleylum, Screwtape, Bono, Rooster, Huldan, Rurab; Pillola, Aristocrap, Eraser og Dud eru nokur av nøvnunum, tú kanst renna teg í á faroese_chat.

Men sjálvt um tað í vissan mun ber til at fjala seg aftanfyri eitt sokalla nick, er tað næstan altið onkur sum veit, hvørji tey veruligu nøvnini eru. Á heimasíðuni hjá faroese_chat, sum kann finnast undir adressuni http://heima.olivant.fo/~fridberg/faroes, er ætlanin at upplýsa, hvørji fólkini eru, sum royna at stýra chatrúminum, teir sokallaðu OP'arnir. Tað eru tey, sum ansa eftir, at farið ikki verður út um mark, og tey hava møguleikan til at tveita fólk á dyr, um tað nú er neydugt.

Og tað er tað við hvørt. Tað eru ikki øll, sum formáa at halda tunguna mitt í munninum og halda tann urbana tónan í hevd. Í lógnum fyri chatrúmið verður mælt fólki frá at bannast, at verða ónærisslig ella í aðrar mátar at stoyta fólk.

Valstrið fyri at koma í tað góða selskapið

Og tað er gravgangur eftir OP-heitinum – í royndum eru eitt klassiskt stríð um makt og ávirkan. Nakrar ferðir um árið er OP-val, og tá skulu verandi OP'arnir velja nýggjar kollegar til tað góða selskapið.

Hetta valið hevur ført við sær illgruna um mutur, sleikjarí og korruptión, og tað eru tey, sum leggja nógv fyri í royndini at vinna sær eftirtráða opheitið. Tað kann í nøkrum serligum førðum næstan minna um valkampanjurnar her heima á klettunum, hóast eingin enn hevur latið seg avmyndað, meðan skjútturmarnar verða brotnar upp. Tað eru fyribils bara hjósareyðu valstrategarnir hjá Nyrup og Eidesgaard, sum mæla til tað.



Skrellispannin við rakstrarópum

Seinastu vikurnar hava vit í samband við hesa greinina fylgt við prátinum á faroese_chat, og tað er neyvan at fornerma nakran at staðfesta, at tað er ikki altið so áhugavert, upplýsandi og undirhaldandi, sum tað kundi verið.

Møguleiki er fyri at tosa undir tveimum eygum, og tað er ivaleyst har, at meiri álvarsamu og sigandi samrøðurnar verða førdar, meðan alrúmið, har øll kunnu skriva og lesa boðmi, ofta verður brúkt sum ein skrellispann hjá teimum, sum hava hug at rópa rakstrarrøp fyri onkrum ítróttarfelag ella tónleikabólki. Ja, tað er líkavið at tú sært lítaða blóðstreymin í ærðrunum.

Men tó so, við hvørt øsast fólk upp av sjálvstýrispráti ella øðrum heitum politiskum málum, og tá kann av og á okkurt skilagott orð fella – okkurt sum er meira undirbygt enn markleysa hálovanin av lokala fótbóltsliðnum ella yndistónleikaból kinum; um tað so enn eru sjónligu fiskarnir úr Gøtu ella teir klikkaðu skoltarnir, har oddafiskurin er maðurin, sum pástóð, at eingin sól er til.

Nei, kanska skínur sólin ikki altið í Gøtu, men viðhvørt raka sólstráirnar faroese_chat. Og tað finnast nógv dømi um, at vinarbond eru knýtt tvørtur um leidningar og telefonstikk, og okkurt dømi er eisini av tí meira heita slagnum, har avleiðingarnar eru telefonsamrøður mitt á nátt og teldupostar, sum kann fáa telduskoltarnar at odna um kapp við heilarnar og innvølin í telduni.

Ein av teimum, sum vit hava tosað við, greiður frá, hvussu hann møtti síni nýggju vinkonu inn á faroese_chat.

– Tað var púra tilvildarligt, at eg kom í prát við júst hana. Vit greiddu hvørjum øðrum frá, hvørji vit vóru og har frá koyrda tað so bara, sigur ungi maðurin, sum hvørki vil hava sítt veruliga navn ella chattnavn við í greinina.

– Fyrsta kvøldið, vit chattaðu, var sambandið hjá mær eitt sindur óstøðugt, so tá eg hevði fingið telefonnummarið hjá henni, gjørdi eg stutt og greitt tað, at eg ringdi til hana. So prátaðu vit eina løtu, og tá vit so hittust aftur á chattinum, prátaðu vit aftur saman.

Síðani hava tey bæði ungu fólkini sent teldubrøv til hvønn annan, tey hava chattað, og telefonsamrøðurnar eru so við og við vorðnar gerandiskostur. Og fyri kortum hitti tey bæði ungfólkini hvør annan, og tað spældi væl av, og chattarin, sum nú er vorðin eitt upplivilsi ríkari, hevur fingið eina staðfesting av, at internetið er meira enn ein endaleys mongd av óvið komandi upplýsingum.

Eitt spark í teldu afturpartin

Faroese_chat er at samanlíkna við ein nógv traffikeraðun krossveg mitt á informatiónsmotorvegnum. Men tú sleppur undan at støðga fyri reyðum ljósi. Og rennur tú teg inn í onkran, gloymir kanska at halda høgravíkiskylduna, er ógvuslígasta avleiðingin eitt spark í telduafturpartin og út av chatrúminum.

Gjøgnum allan dagin finnast nógvir brúkarar á faroese-chat, men um kvøldið kemur talið í hæddina, og tá eru so at siga altið yvir 100 brúkarar inn í senn. Metið, sum javnan verður tikið, nærkast teimum 200 brúkarunum í senn.

Og tað er ilt at staðfesta, hvørji fólkini eru, sum bróka faroese_chat, men ein av teimum, sum hevur fingurin á pulsinum er Sokka-Boiler, sum stovnaði chatrúmið seint í 1997. Grundin til, at føroyska chattið varð bjóðað fram á netinum var fyri at geva føroyingum ein møguleika at chatta á sínum egna máli.

– Mín hóming er, at flestu fólkini eru millum 16 og 25 ár, men tað finnast bæði yngri og eldri brúkara, sigur hann – online á chattinum.

– Nógv av fólkunum eru av Streymoynni, Eysturoyini og úr Norðoyggjum, men tað finnast brúkarar um næstan alt landið, og fleiri eru eisini at finna uttanlands.

– Hetta er ein øðrvísi háttur at vera til uppá. Á chattinum kunnu fólk koma at kennast uttan at hava fordómar mótvegis hvørjum øðrum. Í so máta er chattið øðrvísi enn veruliga lívið, heldur Sokka-Boiler.

Enda aftur í føroyska túnatosinum

Og brúkarnir uttanlands enda ofta aftur mitt í tí føroyska túnatosinum, hitta nýggj og gomul vinfólk heima á klettunum, og staðfesta, at tað ber til at halda eitt tætt samband við føroyingar, fyri tað um bústaðurin er flata Danmark, forboðs-Svøriki ella heimstaðið hjá tí amerikanska dreyminum og Superman.

– Føroyska chattið er ein fráliður møguleiki hjá mær at fylgja við heima í Føroyum. Eg havi fleiri vinfólk á chattinum, og frá teimum fái eg ofta tíðindi, sum ikki kunnu frættast gjøgnum fjølmiðlarnar, sigur ein av útisetunum, sum javnan er at finna á faroese_chat.

– Við hvørt rýkur tíðin avstað, uttan at tú fært nakað sum helst burtur úr, men stundum er okkurt áhugavert at frætta frá teimum, sum tú kennir. Onkur slatur, okkurt stuttligt frá vikuskiftinum ella okkurt annað.

– Og tað ber eisini til at knýta nýggj vinarbond, men av og á kann eg ivast í, um tað er rætt, at eg má leita inn á internetið fyri at finna nýggj vinfólk.

Tað finnast eingin hagtøl yvir brúkarar á føroyska chattinum, men tað eru altið útisetar at finna millum gestirnar, og stundum kunnu teir gerast millum 10 og 20 í tali í senn.

Siggja fjesini aftanfyri nøvnini

Í desember mánaða í fjør tóku fólkini á faroese_chat upp táttin, sum hvør fyritøka, bindiklubbur, saunavinir og skilakammiratar seinastu árini hava gjørt til sín egna. Jólafrokostur, sum tað so rámandi eitur.

Hotel Muntra, har Poul Rustin dagliga brillierar við sínari framúr matgerð, varð karmurin um fyrstu jólaveistluna hjá fólkunum, sum triva í chatkvøði á faroese_chat. Har hittust summir chattarar fyri fyrstu ferð, sóu fjesini aftanfyri tey uppfinsonu nøvnini, og fingu høvi at tosa andlit til andlit.

Og fyrr í ár skipaðu chattarar fyri symposium í Klaksvík, har nógvir av chattaranum hava sína dagligu gong. Og tá var aftur møguleiki hjá chattarunum at hitta hvør annan, um tað so var fyri fyrstu ferð, aðru ferð, ella 87. ferð.

– Tað kann verða stuttligt at møta fólki, sum tú hevur tosað nógv við á faroese_chat, men onkursvegna missir tað eisini sína sjarmu, at tú hittir fólkini aftanfyri nøvnini, sigur Sokka-Boiler.

Og meðan fleiri og fleiri føroyingar ferðast á marknum millum veruleika og internet, kunnu vit bara taka uppaftur eina vending, sum ein av chattarunum brúkti í eini løtu, tá inspiratiónin kom yvir hann:

Real life sucks!